# Konsert & dansur

Fríggjakvøldið 11. mai kl. 21 í
**Atlantis**

Leygarkvøldið 12. mai kl. 23
**Konsert og dansur í**
**Mentanarhúsinum**



Bussar koyra
Av Toftum kl. 23.30
Av Stondum kl. 23.30
Úr Klaksvík kl. 23.30

Úr Vágum/Vestmanna
ring tel. 21 77 53

Úr Havn
ring tel. 59 59 59

Sosialurin Eik ATLANTIC AIRWAYS



## Fýra pedagogar

Søkt verður eftir fýra pedagogum til Barnagarðin á Velbastað at arbeiða 20-40 tímar um vikuna at byrja 1. august 2007 ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðstíðin verður eftir tørvinum hjá stovninum og eftir ynskjunum hjá starvsfólkunum.

Um pedagogar ikki søkja størvini, verður fólk við viðkomandi útbúgvingum og/ella royndum, sett ístaðin.

Nýggi stovnurin hevur stóra høll og egnan bóltvøll og liggur beint við hagan oman fyri Velbastað. Vit hava eisini brúk fyri fólki, sum hava áhuga fyri tónleiki, sangi, sjónleiki, ítrótti og at brúka náttúruna.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Bjarna Clementsen, stovnsleiðara, tlf. 218132.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Barnagarðinum á Velbastað, 176 Velbastaður, í hendi í seinasta lagi mikudagin 30. mai 2007.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**

# Starvslýsingar




á portal.fo

**Kostnaður:** (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

**Kostnaður:** (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo



## Byggifrøðingur [endurlýsing]

Søkt verður eftir byggifrøðingi til Húsaumsitingina hjá Tórshavnar kommunu.

**Arbeiðsøki**
- at vera við í arbeiðinum at umsita kommunalar bygningar
- at skráseta bygningar
- at gera útbjóðingartilfar í samband við umvælingar og viðlíkahald av bygningum
- at hava eftirlit við arbeiðum
- at luttaka í ymsum arbeiði á deildini

**Førleikakrøv**
- tú skalt hava útbúgving sum byggifrøðingur, og tað er ein fyrimunur, um tú ert lærdur húsasmiður
- royndir við tekning í AutoCad, útbjóðing og eftirliti við arbeiðnum
- førleika á brúkarastøði í niðanfyri nevndu forritum
- tú skalt hava koyrikort

Húsaumsitingin brúkar telduforritið Caretaker til skráseting av kommunalum bygningum, og kemur í framtíðini eisini at brúka skipanina til viðlíkahaldsarbeiði. Harumframt verður arbeitt við Word, Excel, MS Projekt, AutoCad, Microstation og Navision.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast møguligt eftir sáttmála millum Føroya Byggifrøðingafelag og Fíggjarmálaráðið. Starvið er fulltíðarstarv.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Mikael Viderø, býararkitekt ella Harald Bjørgvin, leiðara fyri Húsaumsitingina, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn, í hendi seinasta lagið hósdagin 24. mai 2007. Merkið umsóknina „Húsaumsitingin".

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**